**Álit**

**í**

**løgtingsmáli nr. 88/2023: Uppskot til løgtingslóg um fosturtøku (Fosturtøkulógin)**

Landsstýrismaðurin í lógarmálum, Bjarni K. Petersen, hevur lagt málið fram tann 7. mars 2024, og eftir 1. viðgerð tann 22. mars 2024 er tað beint Rættarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 3., 24., 29. og 30. apríl og 2. mai 2024.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við Mammuhjálpina, Føroya Pro Vita, Frítt Val, MEGD, Læknafelag Føroya, Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar, Felagið Føroyskir Sálarfrøðingar, Etiska ráðið, Ljósmøðrafelag Føroya, Javnstøðunevndina, Almannaverkið, Gigni, Hagstovuna, Sjúkrahúsverk Føroya, landsstýrismannin í barna- og útbúgvingarmálum, Djóna Nolsøe Joensen, landsstýriskvinnuna í fíggjarmálum, Ruth Vang, landsstýriskvinnuna í heilsumálum, Margit Stórá, landsstýriskvinnuna í Almanna- og mentamálum, Sirið Stenberg, og landsstýrismannin í lógarmálum, Bjarna K. Petersen.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í tríggjar minnilutar.

**Ein minniluti** (Hervør Pálsdóttir, Kristianna Winther Poulsen og Kim Durhuus) hevur hesar viðmerkingar:

Í Føroyum hava vit havt eina fosturtøkulóg, sum hevur verið óbroytt síðan 1959. Vit allarflestu eru uttan iva samd um, at fosturtøkulógin má dagførast. Mong hava funnist at henni fyri at verið ov ótíðarhóskandi, og at hon í mongum førum verður tulkað ymiskt frá lækna til lækna. Flestøll hava vit eina støðu til fosturtøku, og flestøll kunnu vit taka undir við, at ein lóg, sum hevur verið óbroytt síðani 1959, krevur broytingar.

Tíðin er tí búgvin til at dagføra fosturtøkulógina. Hóast hetta er eitt eymt mál, so er tað neyðugt. Vit vita, at tað eru kvinnur, ið kenna seg noyddar at fara av landinum at fáa fosturtøku, tí tær ikki fáa tað í Føroyum. Hetta er ikki ein støða, ið vit sum samfelag kunnu liva við.

Við hesum uppskotinum verður fosturtøka loyvd upp til viku 12. Eftir viku 12 verður tað eitt fakligt samráð, ið skal taka avgerð um fosturtøku, og bert í heilt serligum førum verða fosturtøkur framdar eftir viku 12. Í dag verða 95% av øllum fosturtøkum í Føroyum framdar áðrenn viku 12.

At seta markið á viku 12 metir hesin minnilutin vera hóskandi. Hetta gevur kvinnuni tíð at hugsa um, hvørja avgerð hon metir vera ta bestu fyri seg og sínar umstøður, eins og tað hóast alt er so tíðliga í graviditetinum sum gjørligt.

At standa í støðuni at skula velja fosturtøku er ikki ein ynskistøða hjá nakrari kvinnu. Eingin kvinna ynskir at gerast óynskt gravid, tó so eru hetta støður, sum uppstanda. Tí skulu vit altíð tryggja okkum, at vit kunnu veita góða og óhefta ráðgeving til tær kvinnur, ið hava tørv á tí.

Tað skulu ikki vera fíggjarstøðan og kringumstøðurnar, sum gera, at ein kvinna kennir seg noydda til fosturtøku. Vit skulu sum politiskur myndugleiki altíð arbeiða fyri at betra okkara sosialu skipanir og trygdarnet, so tað kann lofta teimum, ið detta niður ímillum.

Hetta er sum áður nevnt eitt trupult mál, ið fyri nógv er sera eymt og gongur ímóti teirra sannføring. Vit mugu hava virðing fyri hugsanini hjá hvørjum øðrum. Tískil er tað eisini neyðugt, at starvsfólk í sjúkrahúsverkinum ikki verða tvungin til at fremja nakað, ið gongur ímóti teirra trúgv ella sannføring. Tí metir hesin minnilutin tað vera neyðugt at hava eina undantøkuáseting í lógini fyri løggild heilsustarvsfólk í sjúkrahúsverkinum, so tey kunnu bera seg undan at fremja ella viðvirka til fosturtøku, um tað gongur ímóti teirra sannføring ella trúgv.

Hesin minnilutin setir tískil fram soljóðandi

**b r o y t i n g a r u p p s k o t**

1. **Í § 6 verða sum stk. 2 og 3 sett:**

   "*Stk. 2.* Stríðir tað ímóti etisku ella átrúnaðarligu fatanini hjá einum løggildum heilsustarvsfólki, ið starvast á sjúkrahúsi, at fremja ella viðvirka til fosturtøku, skal viðkomandi eftir áheitan sleppa undan hesum, og sjúklingurin skal verða vístur til annað løggilt heilsustarvsfólk. Hetta er eisini galdandi fyri tey, sum eru undir útbúgving til nevndu størv.
   *Stk. 3.* Ásetingin í stk. 2 er ikki galdandi, um talan er um átrokandi neyðuga læknahjálp, sbr. § 42 í anordning for Færøerne om ikrafttræden af lov om autorisation af sundhedspersoner og om sundhedsfaglig virksomhed."

Viðmerkingar:

Við ásetingini verður tryggjað løggildum heilsustarvsfólki at sleppa undan at fremja ella viðvirka til fosturtøku, um fosturtøka gongur ímóti teirra etisku ella átrúnaðarligu fatan. Ásetingin er grundað á eina hugsan um, at krav um eina ávísa viðgerð ella tænastu í sjúkrahúsverkinum eigur ikki at hava við sær, at starvsfólk eru noydd at fremja ella viðvirka til gerðir, sum ganga ímóti teirra etisku ella átrúnaðarligu fatan.

Áheitanin skal setast fram fyri næsta fyrisetta hjá viðkomandi. Við viðvirkan skilst fyrireikingar til eina fosturtøku, medisinska ella kirurgiska, og fevnir um uppgávur so sum at geva kvinnuni heilivág, doyving o.a. í hesum sambandi. Ásetingin fevnir ikki um uppgávur í sambandi við røkt av kvinnu, sum er innløgd á sjúkrahús aftan á fosturtøkuna.

Ásetingin kann ikki hava við sær, at ein lóglig fosturtøka sambært lógini ikki kann fremjast av tí orsøk, at starvsfólk bera seg undan. Leiðslan í sjúkrahúsverkinum hevur ábyrgd av at leggja viðurskiftini í sjúkrahúsverkinum til rættis og tryggja, at ein lóglig fosturtøka til eina og hvørja tíð kann fremjast, heruppií at viðkomandi deildir eru mannaðar við starvsfólki, sum kunnu viðgera og veita tænastur. Tað vil siga, at um eitt løggilt heilsustarvsfólk ber seg undan, skal leiðslan tryggja, at annað løggilt heilsustarvsfólk kann fremja ella viðvirka til fosturtøkuna.

Sambært § 42 í autorisatiónslógini (Anordning nr. 1472/2013 om ikrafttræden for Færøerne af lov om autorisation af sundhedspersoner og om sundhedsfaglig virksomhed) hevur ein lækni skyldu til at veita neyðuga læknahjálp, tá ið skjót læknahjálp er átrokandi neyðug, til dømis tá ið kvinnan er í

lívsvanda. Tá ið talan er um átrokandi neyðuga læknahjálp sambært § 42 í autorisatiónslógini, er stk. 2 tí ikki galdandi.

Við hesum viðmerkingum og broytingaruppskoti tekur hesin minnilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

**Ein annar minniluti** (Helgi Abrahamsen, Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur og Steffan Klein Poulsen) hevur hesar viðmerkingar:

Spurningurin um fría fosturtøku snýr seg um tvey ymisk rættindi. Annað er rætturin hjá kvinnuni at velja, um hon vil bera og eiga eitt barn, og hitt er rætturin hjá barninum til lívið. Hetta eru tvey grundleggjandi rættindi, har ikki ber til at velja bæði, og bara annar parturin sleppur at velja.

Tað er eingin ivi um, at lívið byrjar við gitnaði, hóast fólk er ósamd um, nær eitt fostur skal roknast sum ein sjálvstøðug persónmenska. Tað er ymiskt frá landi til land, nær fostur fáa lógartryggjaðan rætt til verju, og hetta markið verður flutt frá tíð til aðra – ikki út frá vísindaligum grundgevingum, men einans eftir politiskum ynski. Men líkamikið hvussu vit rokna og grundgeva, so er avleiðingin av fosturtøku altíð, at eitt barn, ein persónmenska, sum annars hevði verið føtt nakrar mánaðir seinni, missir øll síni rættindi og verður ikki føtt.

Undir viðgerðini av málinum hevur Rættarnevndin fingið upplýst, at í sambandi við seinfosturtøkur kemur tað fyri – eisini í Føroyum, at barnið er á lívi eftir fosturtøkuna. Men barnið hevur ikki nakra rættarverju, og tí verður einki gjørt fyri at bjarga tí. Tað verður lagt til síðis at bíða, til tað doyr. Millum annað hetta er ein av orsøkunum til, at nógv heilsustarvsfólk ikki vilja vera við til at fremja fosturtøkur.

Men hetta lógaruppskotið gevur ikki heilsustarvsfólkum rætt til at bera seg undan at luttaka í fosturtøkum. Landsstýrismaðurin segði undir 1. viðgerð, at hann hevði valt hetta frá, tí við at hava henda møguleikan við í lógini, kann tað henda, at tað ikki ber til at fremja eina fosturtøku í Føroyum orsakað av, at starvsfólk mangla.

Tað kann ikki vera rætt, at ein avbjóðing við manglandi starvsfólkum verður loyst við at tvinga heilsustarvsfólk til nakað, sum býður teirra samvitsku ímóti. Tað eru nógvir starvsfólkabólkar, sum eru partur av tilgongdini og inntrivinum í sambandi við eina fosturtøku, og tey eiga øll at hava rætt til at bera seg undan at vera partur av slíkum gerðum.

Eingin ivi er um, at nógvar kvinnur koma illa fyri orsakað av, at tær gerast við barn. Ymiskar umstøður kunnu hava við sær, at tær seta seg ikki førar fyri at eiga barnið, og almennu Føroyar eiga í slíkum førum at stuðla hesum kvinnum so væl sum gjørligt – bæði áðrenn og aftaná føðingina. Men hetta uppskotið snýr seg um fría fosturtøku. Her nýtist einki at tala fyri, at kvinnan hevur stórar avbjóðingar av at eiga barnið. Hon kann, uttan nakra ávísa orsøk, og uttan at spyrja pápan hjá barninum, velja fosturtøku.

Nógv kann tala fyri, at øll skulu hava sjálvsavgerðarrætt, men grundleggjandi spurningurin er, um ein persónur skal hava loyvi til at taka lívið frá einum øðrum persóni, fyri at verja sín egna sjálvsavgerðarrætt. Tað kann ikki vera rætt at loysa trupulleikarnar hjá einum menniskja við at taka lívið frá einum øðrum.

Í sambandi við hetta málið hevur ofta verið grundgivið við sokallaðum “tryggum fosturtøkum”. Spurningurin er, hvønn tað skal vera trygt fyri? Tað at ein einsamallur persónur skal hava loyvi til at avgera, at eitt barn verður tikið úr móðurlívi, og tað at livandi fostur verða løgd til síðis at bíða eftir, at tey doyggja, kann á ongan hátt sigast at vera trygt fyri barnið.

Sambært uppskotinum skal tað vera loyvt at fáa fosturtøku til og við 12. viku av viðgongutíðini. Tó kann fosturtøka eisini fremjast aftaná 12. viku, um serligar umstøður tala fyri tí. Ein av hesum serligu umstøðunum er ættarbregði. Um eitt barn kann fáa álvarsliga sálarliga ella likamliga sjúku orsakað av ættarbregði, so kann tað vera orsøk til, at fosturtøka verður loyvd eftir 12. viku. Tað vil siga, at barninum nýtist ikki at feila annað enn, at tað hevur arvaeginleikar til eina sjúku. Barnið kann annars vera púra frískt.

Hendan reglan er tikin beinleiðis úr donsku lógini, men her mugu vit minnast til, at stórur munur er á arvaeginleikunum hjá dønum og føroyingum. So seint sum um ár 1800 var fólkatalið í Føroyum heilt niðri á umleið 5.000 fólkum, og hesi stívliga 2.000 pørini eru ættarfedrar hjá næstan øllum núlivandi føroyingum. Rættiliga stórur partur av børnunum sum vórðu fødd í Føroyum frá 1900 til 1910 vóru systkinabørn ella trímenningar.

Í 2017 segði stjórin á Ílegusavninum, at tey høvdu skrásett tilsamans 158.000 føroyingar, og av teimum var ein føroyingur ættarfaðir til 149.000. Tað vil siga, at ein einstakur føroyingur, sum livdi í 17. øld, var ættarfaðir til meira enn 94 prosent av øllum skrásettu føroyingunum í ættarbandaskránni. Um ættarbregði skal vera nóg góð orsøk til at geva undantak fyri at sleppa útum 12. viku við fosturtøku, so verður ringt at finna nakran føroying, sum ikki líkur krøvini um undantak. Vit eru mestsum øll í familju og hava arvaeginleikar til nógvar arviligar sjúkur.

Minnilutin undrast á, hvussu illa hugtøk sum sjúka, brek, ættarbregði og avskap verða definerað í uppskotinum. Hesi kunnu brúkast sum grundleggjandi fortreytir fyri at fáa fosturtøku eftir 12. viku. Við so illa defineraðum hugtøkum verður tað upp til samráðið at avgera, hvar markið skal vera fyri at fáa fosturtøku.

Fyri stuttari tíð síðani boðaðu nógvir læknar frá, at teir tóku undir við fríari fosturtøku, millum annað tí at verandi lóg leggur eina stóra ábyrgd á læknarnar. Men við hesum uppskotinum verður ein stór ábyrgd løgd á samráðið, sum skal avgera, hvar markið gongur fyri, nær fosturtøka eftir 12. viku skal vera loyvd.

Nógvar seinfosturtøkur í øðrum londum verða framdar orsakað av, at fostrið ber brek. Skanningar av fostrum seta ofta foreldur í truplar støður, tí tey skulu velja millum eitt barn við breki ella fosturtøku. Talan nýtist ikki at vera um álvarslig brek, tí í ársfrágreiðingum frá danska Abortankenevnet sæst, at til dømis børn við klumpfóti verða vald frá í seinfosturtøkum, hóast tað ber væl til at liva eitt gott lív við klumpfóti.

Tað kann ikki vera rætt, at eitt framkomið, mentað og nýmótans samfelag velur ímillum, hvør er nóg fullkomin til at blíva føddur, og hvør skal veljast frá.

Vit síggja, at á nógvum økjum verða lógarbroytingar gjørdar í okkara grannalondum, sum í fyrsta umfari virka ræðandi, men við tíðini ávirka hesar broytingar eisini rákið í Føroyum. Frí fosturtøka er eitt av nógvum dømum um hetta. Onnur dømi eru aktiv deyðshjálp, frítt hassj og annað. Í løtuni er rákið í okkara grannalondum at markið fyri, nær fosturtøka kann fremjast, verður longt.

Pástandurin um, at liberalisering av fosturtøkulógini fær talið av fosturtøkum at lækka, heldur ikki. Hagtøl úr okkara grannalondum vísa, at talið av fosturtøkum fyri hvørji 1.000 fødd børn er munandi hægri, har frí fosturtøka er galdandi, samanborið við støð, har strong fosturtøkulóg er galdandi. Neyvan er lóggávan einasta orsøkin til hendan munin, men staðfestast má, at øvugi pástandurin er tikin úr leysum lofti. Eisini pástandurin um, at kvinnur í Føroyum, orsakað av verandi lóggávu, keypa ólóglig evni fyri at taka fostur, er ongastaðni skjalfestur.

Minnilutin tekur undir við, at galdandi lóg um fosturtøku treingir til ábøtur, men vit halda ikki, at hetta uppskotið er eitt gott alternativ til verandi lóg. Hetta uppskotið byggir á eina danska lóg sum er 50 ára gomul – tað vil siga bara 18 ár yngri enn galdandi lóg í Føroyum.

Í viðmerkingunum til lógaruppskotið verður sagt, at eitt av endamálunum við uppskotinum er at hava fosturtøkutalið so lágt sum gjørligt. Minnilutin kennir seg sannførdan um, at hetta uppskotið, um tað verður samtykt, fer at økja um talið av fosturtøkum í Føroyum, eins og líknandi lógir hava gjørt í okkara grannalondum.

Við hesum viðmerkingunum tekur minnilutin ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

**Ein triði minniluti** (Henrik Old) tekur ikki undir við málinum.

**Rættarnevndin, 13. mai 2024**

| | | |
|---|---|---|
| Hervør Pálsdóttir<br>forkvinna | Helgi Abrahamsen<br>næstformaður | Kristianna W. Poulsen |
| Henrik Old | Kim Durhuus | Steffan Klein Poulsen |

Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur